


# A.P. Møller-Mærsk byrjar árið við stórum avlopi

**Jan Müller**

21.05.2014 - 09:35

Oljan.fo

Tað gongur strúkandi hjá donsku olju- og reiðarafyritøkuni A.P. Møller-Mærsk. Í morgun kunngjørdi fyritøkan roknskapin fyri fyrsta ársfjórðing, og úrslitið er eitt avlop upp á 11,3 milliardir krónur fyri skatt.

Umsetningurin ársins tríggjar fyrstu mánaðir var knappliga 64 milliardir krónur.

Leiðslan í donsku stórfyritøkuni hevur góðar vónir um tað, sum er eftir av árinum, tí hon sigur nú, at úrslitið í ár verður betri, enn hon hevði roknað við. Í fjør hevði A.P. Møller-Mærsk góðar 20 milliardir krónur í avlopi, og leiðslan segði í morgun, at úrslitið í ár verður umleið knappar 22 milliardir krónur.

**Bingjur og olja**

Tað er serliga bingjureiðaríið Maersk Line, sum stendur seg væl. Í 2013 var úrslitið hjá bingjudeildini 8,1 milliardir krónur, og tað verður betri í ár, sigur leiðslan.

Forstjórin í A.P.Møller - Mærsk, Niels Smedegaard Andersen, segði á tíðindafundi í morgun, at oljudeildin hjá fyritøkuni hevur eisini havt framgongd í fyrsta ársfjórðingi, og at framleiðslan er stór.

Leiðslan væntar, at eftirspurningurin eftir at flyta vørur í bingjum fer at veksa eini fýra ella fimm prosent, men at flutningsprísurin verður framvegis undir trýsti, tí kappingin á hesum marknaðinum er hørð.